VIÐMERKINGAR

# Óskiljandi einskiljing

**Meðan tosað verður um breiðar semjur, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum sent eitt uppskot um at einskilja Atlantsflog til fjølmiðlarnar, áðrenn andstøðan og størsti flokkur á tingi hava sæð tað**



**Høgni Hoydal**

Alt bendir á, at landsstýrið nú eisini ætlar at fáa einskiljingargongdina at enda í politiskum roki og tilvild – eins og øll hini politisku stórmálini.

Nógv hava við røttum funnist at undanfarnu samgongu fyri vantandi vinnupolitikk, og hava spurt, hví Tjóðveldisflokkurin so ofta var ósamdur við landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Orsøkirnar áttu øll at sæð í dag. Tjóðveldisflokkurin hevur seinastu árini gingið á odda í at skapa ein nýggjan vinnupolitikk við eini studningsfríari vinnu og einum stoltum og ábyrgdarfullum vinnulívi, ið kann virka á altjóða pallinum og vinna pening til vælferðina í einum sjálvstøðugum Føroyum.

## Greiða krøv til einskiljingar

Tí hava vit støðugt kravt, at einskiljingar skulu fremjast soleiðis, at tær gagna samfelagsligum áhugamálum og ikki bert nøkrum fáum. Vit hava kravt, at endamálið við einskiljingum skal vera, at vit fáa størri virksemi og virðisøking í Føroyum – og ikki at geva burtur stór samfelagslig virðir, sum vit í felag hava skapt og gera Føroyar til eina vinnuliga koloni.

Vit hava kravt, at virðisbrævamarknaður skal stovnast, so tann nógvi "deyði" kapitalurin í Føroyum kann koma føroyskum vinnulívi í Føroyum til góðar. Vit hava kravt, at alt skal vera væl fyrireikað og at greiðar treytir skulu setast, so vit ikki fáa "russiskar tilstandir", har virðir tilvildarliga verða avreidd og givin sterkastu áhugabólkunum. Vit hava kravt, at tað serliga er vanligt vinnuvirksemi sosum framleiðsla, bankavirksemi o.a., sum skal standa fremst. Vit hava kravt – og hava lagt uppskot fram um, hvussu peningur frá einskiljingum skal brúkast hjá tí almenna.

Og vit hava kravt, at allir flokkar á tingi – eisini andstøðuflokkarnir skulu takast við í arbeiði.

Hesi krøv fingu vit uppfylt í undanfarnu samgongu við bit og slit.

## Einskiljingar sum fjølmiðlashow

Mótvegis hesum hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum staðið við sínum óteljandi ófyrireikaðu útmeldingum um einskiljingar. Hann hevur gjørt tað til eitt slag av ideologiskum fjølmiðlashowi at tosa um einskiljingar. Hann hevur tosað um einskiljingar, eins og er landsstýrismaðurin eitt slag av handilsmanni ella kremmara, sum gongur runt og selur virðini hjá okkum øllum. Hann hevur blandað seg upp í smálutir, tá landsins grunnar hava lagt ætlanir – men í øðrum førum hevur hann ikki latið við seg koma. Og tað einasta hann hevur nátt við tí, er at onki hendir og at øll gerast ótrygg. Bæði vinna, politikarar, starvsfólk og samfelagið alt.

## Ongin breið semja ella altjóðagerð

Tað er onki stuttligt at fáa sínar ringastu vónir váttaðar. Men tað gjørdust tær, nú landsstýrismaðurin enntá við stuðli frá løgmanni og restini av landsstýrinum hevur boðað frá, at Atlantsflog skal seljast fyrst.

Har er onki fyrireikað. Onki endamál. Og ongi av teimum greiðu málum, ið vit í Tjóðveldisflokkinum hava sett fram, eru umhugsað.

Tjóðveldisflokkurin, sum er størsti flokkur á tingi, hevur ikki hoyrt orð ella eið um málið. Men fjølmiðlarnir hava fingið sendandi eitt lógaruppskot frá landsstýrinum.

Tað sigur nakað um seriøsitetin í málinum. Var tað stjórin í eini vinnufyritøka á einum marknaði, sum sendi uppskot um at selja stór virðir út til fjølmiðlarnar, áðrenn nevndin og parteigararnir fingu nakað at vita, so hevði neyvan nakar havt nakað við hann at gera – og fyritøkan hevði mist alt marknaðarvirðið.

Eg havi ikki orð fyri, hvussu vánalig og vandamikil hendan framferðin hjá landsstýrinum er. Fari at loyva mær at spyrja løgmann, um hann veruliga heldur, at nakað skil er í hesari einskiljing?

Uppaftur løgnari er framferðin, tá løgmaður samstundis tosar um breiðar semjur og um altjóðagerð.

Her er ongin roynd til semju. Og her er ongin altjóðagerð, tá løgmaður letur landsstýrismannin spæla hazard við okkara besta portur út í heim.

# Skeinkiloyvi – hvar liggur matstovan

**Finnur Helmsdal**



Havi ikki tosað við nakran av pørtunum, og eingin teirra hevur tosað við meg. Havi hetta bert frá tíðindum í Útvarpinum. Og snýr tað seg um, hvør fær skeinkiloyvi í miðbýnum í Havn., einki, hálvt ella heilt. Varð so fyltur innan av tonkum og spurningum, sum allir súsaðu aftur og fram og upp og niður. Hesir tankar mugu út, og spurningarnir mugu fáa svar. Soleiðis er tað bara.

Útvarpið hevur áður havt tíðindi um Kheops og royndirnar hjá eigaranum at fáa skeinkiloyvi, men til fánýtis. Og nú frætta vit so, at loyvisnevndin bert játta honum hálvt skeinkiloyvi. Einasta orsøk tykist vera, at matstovan liggur í gongugøtu.

Fyri stuttari tíð síðan gingu tíðindi um, at ein av háborgunum hjá heimamissiónini, Sjómansheimið, varð selt tryggingini. Og mín sann, um ikki sama loyvisnevnd upp á rekordtíð, ja, við einum fingrabresti og vupsi, hevur játtað Hotel Tórshavn, sum heimið nú eitur, fult skeinkiloyvi. Vit fingu ongar grundgevingar fyri hesum. Eitt vita í hvussu øll, sum búgva ella vanliga eru í Havn, at miðbýurin allur sum hann er, er ein gongugøta. Og liggur Hotel Tórshavn tí eisini, har hópur av fólki gongur. So hví Hotel Tórshavn skal fáa heilt, meðan Kheops bert kann fáa hálvt skeinkiloyvi, ja, tað vil eg hava eitt skikkað svar uppá. Hetta sum ein, ið hevur búð í Havn í góð 53 ár.

Tankarnir og spurningar sum rasa innan í mær í hesum sambandi, teir eru m.a.:

snýr jattan til skeinkiloyvi seg eisini um átrúnaðarligar losjufelagsskapir?

snýr játtan til skeinkiloyvi seg eisini um heldur at verja ávísar íløgur enn aðrar?

Snýr játtan til skeinkiloyvi seg eisini um matstovan er granni hjá samkomu ella ikki?

Nú er tað soleiðis, at stjórin á tryggingini og formaðurin í loyvisnevndini eru í somu samkomu. Tryggingin hevur gjørt nógvar íløgur seinastu árini, tað er helst umráðandi at ein íløga sum tann, teir hava gjørt í Hotel Tórshavn, fer at bera seg. Og so liggur matsovan Kheops beint yvir av Ebenezer.

Eg veit ikki, hvat eg skal trúgva, men eg vóni inniliga, at formaðurin í loyvisnevndini, á hesum síðunum, kann geva mær og øllum øðrum havnaborgarum eina borðbæra frágreiðing um, hví Hotel Tórshavn fær fult skeinkiloyvi, og hví Kheops ikki fær meira enn hálvt. Tað vóni eg sanniliga, og hatta tvætlið um gongugøtuna kann sami formaður gott gloyma. Sig okkum opið og ærliga, hvør orsøkin er, soleiðis at havnaborgarar kunnu hava álit á, at umsitingin av skeinkiloyvum ikki er tann beri tann beri vina- og kenningapolitikkur, at sama umsiting ikki er í skrásettum parlagi við losjubrøðrum og skutilsveinum hjá stórkapiltalinum.

Hoyrdi annars samrøðu við ungan mann í Útvarpinum hósmorgunin. Hesin varð settur at stjórna matstovu og ítróttarcafé í Bowlinghøllini. Ljóðaði sum eit spennandi átak. Nú spurdi útvarpsmaðurin um skeinkiloyvi. Tað høvdu teir ikki fingið enn, men ungi maðurin sá tað bara sum ein formalitet at fáa fult skeinkiloyvi. Ergo, nøkur skulu, ja, pínast og plágast og, av óskiljandi orsøkum, ikki fáa tað, sum er ein formalitetur at fáa hjá ávísum. Eg spyrji bara.

**P.s.:** Og annars hvørki skilji ella dugi eg at síggja nakra sum helst meining í, at ein kantina hjá Tórshavnar kommunu, nú skal nýtast og misnýtast í, longu rættiliga strongdu, kappingini á matstovuøkinum. Tórshavnar kommuna skal ikki minka útreiðslurnar til innrætning av einari kantinu, við at elva til kappingaravlaging á einum øki, sum annars ger Havnina til ein enn meira attraktivan høvuðsstað.

# Eldraráð í Tórshavn

**Elinborg Trónd Johansen**
*valevni til Eldraráðið í Tórshavn*

Ein politikari segði herfyri, at vit mugu integrera tey eldri í samfelagið, men vit eru samfelagið. Tað eru vit, sum nú ikki eru heilt ung longur, ið hava skapt hetta samfelag.

## Áhugafelag fyri eldri

Fólk, sum eru farin um tey 60 árini, eiga ongan felagsskap, ið talar teirra søk. Vit hava einki fakfelag, sum verjir okkara áhugamál, og vit hava eingi vápn, vit kunnu nýta fyri at fáa okkara ynski ella krøv framd.

Tað er ikki eitt pensionistafelag okkum tørvar, men ein samgonga, sum talar søk teirra eldru, og vil bøta um viðurskiftini teirra, við treytunum hjá teimum eldru sjálvum.

## Fólkapensiónin

Fólkapensiónin, sum frammanundan er alt ov lítil, hevur ikki verið regulerað í mong ár, og hvørja ferð fakfeløgini fáa ein lønarvøkstur, minkar virði á fólkapensiónini samsvarandi. Tí má tað vera eitt krav, at pensiónin hækkar við prísvøkstrinum, og at hon eisini hækkar samsvarandi við lønarvøkstrinum hjá fakfeløgunum.

## Røktarheim

Ofta tá fólk, og ikki minst politikarir, tala um tað, ið gjørt er fyri tey eldru, vísa tey á røktarheim, ellisheim, heimarøkt og tílíkt, men hetta er statistikkur.

Vit vita hvussu nógv pláss eru á Lágargarði, á Tjarnargarði og á Ellisheiminum, og vit vita eisini hvussu nógvum plássum tørvur er á, eins og vit kenna tørvin á heimahjálp, og hvussu stórt tilboðið er.

Alt hetta er í fínasta lagi. Tað, sum er neyðugt í hesum sambandi, er at trýsta á so at munurin millum tilboð og tørv verður minni enn hann er og helst verður burtur.

Ongatíð betur um tilboðið er størri enn tørvurin.

## Virksemi

Tá fólk tala um eldrapolitikk, hugsa tey um tey sjúku og veiku, um røktarheim og umlættingarheim. Sum so er alt í lagi við tí, men tað er Guð havi lov bara ein lítil partur av teimum eldru, ið eru sjúk og veik.

Meginparturin av tí eldra fólkinum eru væl fyri til heilsu, men hava tørv á at fáa stuðul til, við teirra egnu treytum, at klára seg sjálvi best og longst sum lívsglaðir, virknir og javngóðir limir í samfelagnum.

Fleiri eldri fólk hava ríkiligt at takast við, eitt nú ein bát, nakrar seyðir ella eina eplaveltu. Onnur hava okkurt handaligt at takast við, sum at tilevna eitthvørt úr træ, úr jarni, beini ella ull, og so eru tey, ið skriva, men eftir er ein bólkur, sum einki veit sær.

Tað er umráðandi at aktivera henda bólkin, so hesi hava nøkur tilboð, ið kunna geva lívinum meining og innihald. Tilboð, við treytunum hjá teimum eldru, uttan at tey verða ómyndiggjørd.

## Bústaðir

Summi eldri fólk ynskja eina minni íbúð ella eini minni hús, enn tey búgva í, og her í kommununi man tørvur vera á einum 20 til 30 ellisíbúðum árliga, ið ikki eru dýrari enn pensionistar eru førir fyri at gjalda.

Skuldi eg sjálv valt hesa loysn, skuldi tað verið eitt stað, har møguleiki var fyri at fingið kropsliga venjing, har ein lítil svimjingarhylur var, og har tú kundi fingið vitjan av teimum nærmastu, hevur tú stundir til tað, og kundi hugna tær við einum drekkamunni, ella ein bita við einum glasi afturvið.

## Heilsurøkt

Umframt hjálp frá fysioterapeuti, socialráðgevara, løgfrøðingi og kostráðgeva er eisini ein ávísur tørvur innan heilsuøkið. Eitt nú hevði tað komið væl við, um eldri fólk høvdu tilboð um fótarøkt, tannarøkt, hjálp til brillur, hoyriapparat og tílíkt. Vit hava eina skipan við tannarøkt og heilsurøkt til børn, hví ikki eisini hava tilboð til eldri fólk? Eitt tílíkt tilboð hevði sett Tórshavnar Kommunu á heimskortið.